


# NÁM-KT

# Skeiðs- og framløgufaldari

Íblástur til skynsama og tilvitaða kt-nýtslu í undirvísingarhøpi

HEYSTIÐ 2022

# Skeiðs- og framløgufaldari

## SAMBAND

Setið tykkum í samband við kt-toymið í Námi fyri at bíleggja skeið:

Telefon: 665161
Teldupostur: nam-kt@skulin.fo
Heimasíða: nam-kt.skulin.fo

## NÁM-KT

Í hesum lítla faldara er eitt lítið yvirlit yvir tey skeið og framløgur, sum til ber at bíleggja frá kt-toyminum á Námi. Endamálið er at gera tað meira sjónligt, hvat tit á skúlunum kunnu nýta kt-toymið til. Við hesum verður lagt upp til, at kt-toymið kemur á vitjan á tykkara skúla, t.d. á námsfrøðiligum fundum ella á fyrieikingardøgum og líknandi.

Skeiðsyvirlitið og ásettu tíðirnar eru vegleiðandi. Hetta merkir, at tað ber til at tillaga skeiðini eftir tørvi. Tað ber eisini til at fáa onnur skeið, um ynski er um tað. Eisini er møguligt at gera skeiðini í hesum faldaranum longri, um ynski eru um, at lærararnir skulu arbeiða sjálvir við amboðunum. Við hesum vóna vit, at koma tættari at skúlunum og soleiðis veita eina betri tænastu.



## NÁM-KT Í TEAMS

Í Teams er eitt toymi við heitinum NÁM-KT, sum hevur til endamáls at vitanardeila og kunna um kt í undirvísingini. Allir lærarar hava atgongd til hetta toymið. Tað ber til at finna toymið við at skanna QR-koduna niðanfyri.
Til toymið er eisini ein tilhoyrandi síða, har allar vegleiðingar verða lagdar. Hendan síða er at finna á nam-kt.skulin.fo.




# /2021-22

Skeiðsfaldarin hjá kt-toyminum í Námi var fyrstu ferð at síggja skúlaárið 2021/22. Fleiri skúlar hava tikið av møguleikanum og havt vitjan av toyminum.




# /2022-23

Skúlaárið 2022/23 verður arbeitt víðari við faldaranum, og er úrslitið faldarin, tú situr við nú. Skeiðs- og framløguútboðið er vaksið nakað, og vónandi verður undirtøkan eins góð ella betri enn seinasta ár.

# Innihaldsyvirlit


Kt-didaktikkur ........ 4

Skrivligar innlatingar ........ 6

Lesing ........ 8

Framløgur ........ 9

Samstarv og samskifti ........ 10

Lærarafyrireiking ........ 12

Fjarundirvísing og netfundir ........ 13

Kervi ........ 14

WISEflow ........ 15




# Kt-didaktikkur

"KT-DIDAKTIKKUR" ER EITT YVIRSKIPAÐ HUGTAK FYRI KT Í UNDIRVÍSINGARSAMANHANGI. VIÐ HESUM VERÐUR DENTUR LAGDUR Á EITT FAKLIGT ØKI, SUM BÆÐI SNÝR SEG UM AT FATA OG NÝTA KT Í UNDIRVÍSINGINI. TIL BER AT BIÐJA UM EINA KT-DIDAKTISKA FRAMLØGU, SUM ER VIÐKOMANDI FYRI TYKKUM. Í FRAMLØGUM BER EISINI TIL AT INNDRAGA STAKDØMI (CASE'IR), SUM LÆRARARNIR SÍÐANI ARBEIÐA VIÐ. EIN FRAMLØGA KANN VERA MILLUM 30 OG 60 MINUTTIR.

NIÐANFYRI ERU NØKUR UPPSKOT UM FRAMLØGUR.

## 1 HVUSSU HUGSA VIT KT-DIDAKTISKT?

**Lýsing:** Hvussu eiga vit at hugsa kt í undirvísingina? Hvørja ávirkan hevur tøkni á eina undirvísingarstøðu?

Í framløguni verður hugt at hugsanarháttum í sambandi við kt, og hvussu fakliga vitanin hjá lærarum er ein av grundarsteinunum undir skynsamari kt-nýtslu. Eisini verður hugt at fyrimunum og vansum, sum kt í undirvísingini kann hava við sær.

## 2 KT-FØRLEIKAR HJÁ LÆRARUM

**Lýsing:** Hvørjar kt-førleikar verður mett, at lærarar eiga at hava fyri at nýta kt skynsamt í undirvísingini?

Her verður hugt nærri at, hvussu ymiskir førleikar innan ymisk øki eru umráðandi fyri læraran, sum fegin vil nýta kt í undirvísingini.

## 3 SKAPANDI LÆRITILGONGDIR OG VIRKNIR NÆMINGAR

Lýsing: Hvørjir møguleikar eru, sum gera næmingar virknar á ymiskan hátt?

Mett verður, at tað er týdningarmikið, at næmingar eru virknir í sambandi við kt í undirvísingini. Í hesi framløguni hyggja vit at, hvussu ymisk amboð kunnu leggja upp til skapandi læritilgongdir, har næmingarnir gera egnar framleiðslur og á ymiskan hátt eru virknir við tøkni.





### NÁM vitjar Heilsuskúla Føroya

**Ein av vitjanunum hjá kt-toyminum skúlaárið 2021/22 var á Heilsuskúla Føroya. Skúlin bað um eitt skeið í, hvussu fjarundirvísing kann skipast.**

Luttakararnir søgdu soleiðis um dagin:

"Í gjár var seinasti skúladagur, áðrenn summarfrítíðina hjá næmingunum á Heilsuskúla Føroya, men ikki hjá okkum starvsfólkum.
Í dag høvdu vit næmingaleiklutin á sera áhugaverdum og læruríkum skeiði í fjarundirvísing, sum Tóri og Leivur úr Námi skipaðu fyri.
Túsund takk fyri vælskipað og læruríkt skeið, so vit kenna okkum tryggari í at skipa fjarundirvísing okkara næmingum at gagni."

## 4 TALGILDAR SKRIVITILGONGDIR OG AFTURBOÐANIR

**Lýsing:** Hvussu kann kt nýtast á ymiskan hátt til skrivligar uppgávur hjá næmingum, og hvussu kunnu vit arbeiða við afturboðanum í sambandi við hetta?

Í hesi framløguni hyggja vit at skrivitilgongdum, sum leggja upp til, at næmingar samstarva og samskriva. Vit hyggja eisini at formativum eftirmetingarháttum, sum kunnu styrkja læritilgongdina hjá næmingunum.

## 5 KT OG NÝGGIR SAMSTARVSMØGULEIKAR

**Lýsing:** Hvussu kann kt nýtast á ymiskan hátt til skrivligar uppgávur hjá næmingum, og hvussu kunnu vit arbeiða við afturboðanum í sambandi við hetta?

Í hesi framløguni hyggja vit at skrivitilgongdum, sum leggja upp til, at næmingar samstarva og samskriva. Vit hyggja eisini at formativum eftirmetingarháttum, sum kunnu styrkja læritilgongdina hjá næmingunum.

# Skrivligar innlatingar



## 1 EINSÆRIS UPPGÁVUR Í TEAMS

### EINSÆRIS UPPGÁVUR Í TEAMS

**Lýsing:** Hvussu kanst tú nýta Teams til innlatingar í flokkinum? Vit hyggja at og arbeiða við innlatingarfunkuni á Teams.

Á skeiðnum verður m.a. hugt at:
- Hvussu tú kanst nýta Teams til uppgávuinnlating.
- Hvussu næmingurin letur uppgávu inn.
- Hvussu uppgávur verða rættaðar.

**Tíð:** 45 min. (skjót gjøgnumgongd) / 1-2 tímar (gjøgnumgongd saman við lærarum).

## 2 BÓLKAARBEIÐI Í TEAMS GEV NÆMINGUNUM FYRISØGN, MÁLUPPGÁVU ELLA FIMISROKNING FYRI Í WISEFLOW

**Lýsing:** Hvussu kanst tú nýta Teams til bólkaarbeiði í flokkinum? Vit hyggja at og arbeiða við bólkafunkuni í Teams.

Á skeiðnum verður m.a. hugt at:
- Hvussu tú kanst stovna uppgávur og bólkar í uppgávupartinum í Teams.
- Hvussu tað sær út hjá lærarанum.
- Hvussu tað sær út hjá næminginum.

**Tíð:** 45 min. (skjót gjøgnumgongd) / 1-2 tímar (gjøgnumgongd saman við lærarum).

## 3 GEV NÆMINGUNUM FRAMSETING FYRI Í WISEFLOW

**Lýsing:** Hvussu kann eg geva næmingum framseting fyri í WISEflow?

Á skeiðnum verður m.a. hugt at:

- Hvussu tú stovnar eina framseting.
- Hvar tú finnur tilfar (stílevni, eykatilfar og annað).
- Hvussu tú virkjar framsetingina, soleiðis at hon er sjónlig fyri luttakarunum.

**Tíð:** 30 min (skjót gjøgnumgongd) / 1 tími (gjøgnumgongd saman við lærarum).

## 4 GEV NÆMINGUNUM FYRISØGN, MÁLUPPGÁVU ELLA FIMISROKNING FYRI Í WISEFLOW

**Lýsing:** Hvussu kanst tú skjótt brúka uppgávur, sum longu eru stovnaðar í WISEflow, í undirvísingini?

- Víst verður á, hvussu tú skjótt kanst nýta uppgávur úr innihaldsbankanum.

**Tíð:** 30 min. (skjót gjøgnumgongd) / 1 tími (gjøgnumgongd saman við lærarum).

## NÁM vitjar í skúlanum á Skála

**Ein av vitjanunum hjá kt-toyminum skúlaárið 2021/22 var í Skála skúla. Skúlin vildi læra meir um WISEflow, og hvussu amboðið kann nýtast í gerandisdegnum. Eitt nú til skrivligar innlatingar.**

Skúlaleiðarin segði soleiðis um dagin:

**"Vit vóru sera væl nøgd við WISEflow-skeiðið. Tað var ein góð javnvág ímillum tað praktiska og tað tekniska. Tað er sjálvsagt ymiskt, hvat vit vistu frammanundan, men skeiðið varð skipað soleiðis, at øll kundu vera við. Gott er eisini at vita, at ein altíð kann venda sær til kt-toymið í Námi, um brúk er fyri vegleiðing."**

# Lesing

## 1 MENNING AV LESIFØRLEIKUM HJÁ NÆMINGUM VIÐ TEAMS

**Lýsing:** Hvussu kanst tú menna lesiførleikarnar hjá næmingum, serliga í donskum og enskum, í Teams? (Hetta kann eisini brúkast í føroyskum, men tá eru nakrar avmarkingar).

Á skeiðnum verður m.a:

- Hugt at og arbeitt við lesimennigarfunkuni á Teams.
- Arbeitt við at leggja lesiuppgávur út og hyggja at rættingum og viðmerkingum, ið kunnu gerast.

**Tíð:** 30 min. (skjót gjøgnumgongd) / 1 tími (gjøgnumgongd saman við lærarum).



## 2 I-BØKUR: ATGONGD TIL ALLAR BØKUR FRÁ NÁMI Á EINUM STAÐ

**Lýsing:** Hvussu kunnu næmingar og lærarar á ein lættan hátt nýta i-Bøkur í undirvísingini?

Á skeiðnum verður m.a:

- Víst hvussu ritað verður inn á pallin.
- Víst hvussu tað á lættan hátt ber til at leita eftir bókum og at merkja hesar.
- Hugt at teimum ymisku funkunum og tilfarinum, sum eru í i-Bókunum.

**Tíð:** 30 min. (skjót gjøgnumgongd) / 1 tími (gjøgnumgongd saman við lærarum).




# Framløgur

## 1 SWAY Í SAMBANDI VIÐ VERKÆTLANARARBEIÐI

**Lýsing:** Hvussu kunnu næmingar nýta Sway til framløgu av verkætlanararbeiði?

- Á skeiðnum verður tosað um forritið, og hvussu tað kann nýtast til at skapa eina framløgu.

**Tíð:** 40 min. (skjót gjøgnumgongd) / 2 tímar (gjøgnumgongd saman við lærarum).

## NÁM vitjar í Eysturskúlanum

**Ein av vitjanunum hjá kt-toyminum skúlaárið 2021/22 var í Eysturskúlanum. Skúlin vildi læra meir um talgildisbúgving og Teams. Viðvíkjandi Teams varð dentur lagdur á, hvussu tú kanst geva næmingum afturboðan í sambandi við skrivligar innlatingar.**

Luttakararnir søgdu soleiðis um dagin:

**"Vit heittu á kt-toymi í Námi um at hava skeið í talgildisbúgving og Teams fyri øllum lærarunum í Eysturskúlanum. Vit vóru sera væl nøgd við skeiðið. Javnvágin ímillum framløgur og verkligt arbeiði var góð, og eisini var innihaldið sera viðkomandi fyri øll, bæði roynd og óroynd. Skeiðshaldararnir dugdu sera væl at tillaga innihaldið til einstaka lærararan. Vit vilja viðmæla øllum skúlum at bjóða kt-toyminum í Námi á vitjan."**

# Samstarv og samskifti

## 1 STARVSFÓLKASAMSTARV OG SAMSKIFTI Í TEAMS

**Lýsing:** Hvussu kann Teams skipast, so tað gerst lætt hjá starvsfólkum at samstarva?

Á skeiðnum verður m.a. hugt at:

- Hvussu tú kanst skipa eitt toymi við rásum.
- Hvør samanhangurin er millum Teams og SharePoint (har fílurnar liggja).
- Hvussu tú lættliga finnur fílur aftur.

**Tíð**: 1 tími (skjót gjøgnumgongd) / 2 tímar (gjøgnumgongd saman við lærarum).

## 2 NÆMINGASAMSTARV OG SAMSKIFTI Í TEAMS

**Lýsing:** Hvussu kann Teams skipast, so tað gerst lætt at samskifta við næmingar?

Á skeiðnum verður m.a. hugt at:

- Hvussu tú kanst skipa eitt flokstoymi við rásum.
- Hvørjar funkur eru hentar í einum flokstoymi.

**Tíð:** 1 tími (skjót gjøgnumgongd) / 2 tímar (gjøgnumgongd saman við lærarum).






## 3 ONENOTE Í UNDIRVÍSINGINI

**Lýsing:** OneNote er eitt talgilt ringbind, har tað er lætt at savna alskyns tilfar á einum stað.
Her ber til at goyma tað, sum var skrivað á talvuna, fílur, myndir, video o.a.

Á skeiðnum verður m.a. hugt at:

- Hvussu tú kanst skipa títt undirvísingartilfar við OneNote.
- Hvussu tú kanst nýta OneNote saman við næmingunum.

**Tíð:** 30 min. (skjót gjøgnumgongd) / 1-3 tímar (gjøgnumgongd saman við lærarum).

## 4 SHAREPOINT FÍLUGOYMSLA: GOYMIÐ TYKKARA FELAGS TILFAR Á EINUM TRYGGUM STAÐ

**Lýsing:** SharePoint fílugoymslan virkar sum OneDrive, men er eitt felags goymslustað.

Á skeiðnum verður m.a. hugt at:

- Hvussu tú kanst goyma alskyns tilfar í SharePoint.
- Hvussu tú kanst samstilla (synkronisera) hetta við telduna.
- Hvussu tú kanst deila tilfar úr SharePoint við onnur.
- Hvussu tit kunnu samstarva og samskriva í skjølum.

**Tíð:** 30 min. (skjót gjøgnumgongd) / 1 tími (gjøgnumgongd saman við lærarum).

# Lærarafyrireiking

## 1 ONEDRIVE: GOYM TILFAR Á EINUM TRYGGUM STAÐ

**Lýsing:** Við OneDrive ber til at leggja tilfar á eitt trygt stað, sum altíð er atkomuligt.

Á skeiðnum verður m.a. hugt at:

- Hvussu tú kanst goyma alskyns tilfar í OneDrive.
- Hvussu tú kanst samstilla (synkronisera) hetta við telduna.
- Hvussu tú kanst deila tilfar úr OneDrive við onnur.

**Tíð:** 30 min. (skjót gjøgnumgongd) / 1 tími (gjøgnumgongd saman við lærarum).

## 2 ONENOTE SUM FYRIREIKINGARAMBOÐ

**Lýsing:** OneNote er eitt talgilt ringbind, har tað er lætt at savna alskyns tilfar á einum stað.
Her ber til at goyma tað, sum var skrivað á talvuna, fílur, myndir, video o.a.

Á skeiðnum verður m.a. hugt at:

- Hvussu tú kanst skipa títt OneNote, so tað passar til júst tín tørv.
- Hvussu tú kanst goyma og skipa tilfar, sum skal nýtast til undirvísingina.
- Hvussu tú kanst taka notatir og altíð hava atgongd til tær.

**Tíð:** 30 min. (skjót gjøgnumgongd) / 1-3 tímar (gjøgnumgongd saman við lærarum).

## 3 LÁN TILFAR Á MITCFU

**Lýsing:** Í mitCFU er møguligt læna ymiskt undirvísingartilfar.

Á skeiðnum verður m.a. hugt at:

- Hvussu tú kanst læna eitt flokssett.
- Hvussu tú kanst læna filmar o.tíl. til næmingarnar.
- Hvussu tú kanst læna ebøkur til næmingarnar.

**Tíð:** 45-60 min.

# Fjarundirvísing og netfundir

## 1 TEAMS-FUNDIR

**Lýsing:** Hvussu kann eg á góðan hátt nýta Teams til netfundir?

Á skeiðnum verður m.a. hugt at:

Áðrenn netfundurin byrjar:

- Hvussu tú kanst tryggja tær, at bara tú og ikki onnur sleppa at stýra netfundinum.
- Hvussu tú kanst tryggja tær, at ljóðið er gott, áðrenn netfundurin byrjar.

Meðan netfundurin er:

- Hvussu tú deilir skíggjan (allan skíggjan ella bert okkurt ávíst vindeyga).
- Hvussu tú kanst nýta ymisk forrit á fundinum.

Aftan á netfundin:

- Hvar tú finnur upptøkuna, um netfundurin varð upptikin.

**Tíð:** 1 tími (skjót gjøgnumgongd) / 2 tímar (gjøgnumgongd saman við lærarum).

## 2 FJARUNDIRVÍSING Í TEAMS

**Lýsing:** Hvussu kann eg á góðan hátt nýta Teams til fjarundirvísing?

Á skeiðnum verður m.a. hugt at:

Áðrenn undirvísingina:

- Hvussu tú kanst tryggja tær, at bara tú og ikki onnur sleppa at stýra Teams-undirvísingini.
- Hvussu tú kanst tryggja tær, at ljóðið er gott, áðrenn undirvísingin byrjar.

Meðan undirvíst verður:

- Hvussu tú deilir skíggjan (allan skíggjan ella bert okkurt ávíst vindeyga).
- Hvussu tú kanst nýta ymisk forrit í undirvísingini.

Aftan á undirvísingina:

- Hvar tú finnur upptøkuna, um undirvísingin varð upptikin.
- Hvar tú finnur fráveruskrásetingina.

**Tíð:** 1 tími (skjót gjøgnumgongd) / 2 tímar (gjøgnumgongd saman við lærarum).

# Kervi

## 1 UMSITING AV KERVI

**Lýsing:** Hvussu umsiti eg Kervi rætt?

Á skeiðnum:

- Gjøgnumganga vit Kervi.
- Gjøgnumganga vit teir ymisku leiklutirnar og skrásetingarnar, sum skulu gerast.
- Arbeiða vit við tímatalvu (flokkar, lærarar og næmingabólkar), fráveruskráseting, hagtølum, innflyting av næmingum og rætta skráseting við p-tali.

**Tíð:** 30 min (skjót gjøgnumgongd) / 1 tími (gjøgnumgongd saman við skrivarum/lærar-um/leiðslum).

## 2 NÝTSLA AV KERVI SUM LÆRARI

**Lýsing:** Vit vísa, hvussu lærarar kunnu nýta Kervi.

Á skeiðnum verður m.a. hugt at:

- Hvussu tú skrásetir fráveru.
- Hvussu tú sært fráveruna hjá næmingunum.
- Hvussu tú gevur met.

**Tíð:** 30 min.



# WISEflow

## 1 INNLEIÐSLA Í AT GERA UPPGÁVUR Í WISEFLOW

**Lýsing:** Hvussu kann eg gera mínar egnu uppgávur og gera broytingar í teimum uppgávum, sum longu eru í innihaldsbankanum?

Á skeiðnum:

- Hyggja vit at og arbeiða við høvunda- og umsitarapartinum av WISEflow.
- Gera vit uppgávur og leggja tær út til næmingar at loysa.

**Tíð:** 1 tími (skjót gjøgnumgongd) / 2 tímar (gjøgnumgongd saman við lærarum).

## 2 PRÓVDØMING Í WISEFLOW

**Lýsing:** Hvussu próvdømi eg í WISEflow?

Á skeiðnum:

- Hyggja vit at og arbeiða við próvdómaraamboðnum, og hvussu tú kanst rætta og geva met á WISEflow.

**Tíð:** 45 min. (skjót gjøgnumgongd) / 1 tími (gjøgnumgongd saman við lærarum).



nam-kt@skulin.fo - nam-kt.skulin.fo - +298 665161

NÁM